# Gravesen spjaðir gleði í Everton

Thomas Gravesens er vendur aftur til sítt gamla felag Everton, eftir at hann hevur verið og roynt seg í Real Madrid og Celtic, og hetta hevur økt um liðandan hjá liðfeløgum hansara. - Hann hevur lyft okkum øll, síðan hann kom aftur. Hann er fantastiskur. Eg var errin av honum, tá hann spældi í Real Madrid, men nú er hann aftur her, hann er superprofessionellur. Ein maður við umsorg, og hann gevur sær stundir til øll, sigur fysioterapeuturin Mick Rathbone við Everton TV.



# Søguligur sigur til donsku U-17 genturnar

Sigurin hjá danska U-17 gentulandsliðiðnum móti Armenia var søguligur á meira enn ein hátt.
Á fyrsta sinni spældi eitt danskt U-17 gentulið í EM, og úrslitið gjørdist eisini til metstóran sigur til danir. Heili 24-0 varð endaliga støðan, og má sigast, at hetta er vorðið sum byrjan hjá teimum reyðu og hvítu.



Landsliðsvenjarin í samrøðu við Hilmar Jan Hansen og Útvarpið eftir venjingina á tjóðarleikvøllinum Olimpiysky í gjárkvøldið

Mynd: Rólant Waag Dam

# Liðið varð sett í gjárkvøldið

**Til venjingina í gjárkvøldið á tjóðarleikvøllinum í Kiev avdúkaði Jógvan Martin Olsen tað, sum eftir øllum at døma verður føroyska uppstillingin í kvøld**

LANDSLIÐIÐ
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

**Kiev, Ukraina:** Talan var um ein lætta og lutfalsliga stutta venjing. Kortini kom týðiliga til sjóndar, hvussu Jógvan Martin Olsen hevur ímyndað sær, at føroyska liðið skal síggja út í kvøld.

Jákup Mikkelsen er málverji. Johan Troest Davidsen sleppur at royna seg á høgra bakki. Jón Rói Jacobsen og Óli Hansen manna miðverjuna, og Einar Hansen er afturvaldur á vinstra bakki.

Høgri miðvallarleikari verður Símun Samuelsen. Hann skiftur sostatt síðu í mun til dystin móti Fraklandi. Mitt á vera Mikkjal Thomassen, sum er tøkur, og Atli Danielsen, sum hevur sitið leikbannið av sær. Uttast í vinstru verður Christian Høgni Jacobsen.

Fremstu menninir vera teir somu sum seinast: Rógvi Jacobsen og Christian Lamhauge Holst.

## Gevur seg sjálvt

Hetta var í hvussu so er tað, sum framgekk í dystinum, ið spældur var eina løtu, har omanfyri nevnda manning spældi móti hinum sjey leikarunum. Jógvan Martin Olsen segði tó ongantíð, at hetta vóru teir ellivu, hann fór at senda á vøllin í kvøld, men viðgekk at verjan helst verður henda.

– Tað er øgiliga sannlíka, at vit stilla við hesi verjuni, segði Jógvan Martin Olsen eftir venjingina. Hetta merkir at Christian Høgni Jacobsen verður fluttur longur fram á vøllin.

– Tað var eisini planurin at varðveita Christian Høgna uppi á vøllinum seinast, men av tí at Johan varð skaddur, fingu vit ikki troytt tann møguleikan. Tað var eisini ein missur ikki at hava Christian Høgna í vinstra borði seinast, ásannaði Jógvan Martin Olsen og nevndi síðani teir báðar dystirnar móti Italia og Skotlandi, har Christian Høgni Jacobsen spældi so væl.

Óli Hansen sleppur at royna seg í miðverjuni undir liðini á Jón Róa Jacobsen. Tá Fróði Benjaminsen gav avboð, hevði Jógvan Martin ikki so nógvar aðrar møguleikar, so tað gav seg sjálvt.

Á sentrala miðvøllinum kemur Atli Danielsen inn fyri Súna Olsen. Tað er púra natúrligt, heldur landsliðsvenjarin:

– Eg havi altíð sæð Atla sum ein møguleika til miðvøllin. Tað er eisini har hann spælir í Frem. Men tað vísir seg at vera sera trupult at byggja nakað upp við liðnum, tá tað er broytingar hvørja ferð og fleiri leikarar ikki eru tøkir, sigur Jógvan Martin Olsen, landsliðsvenjari.

Jógvan Martin Olsen segði síðani, at leikarar gleða seg til dystin í kvøld:

– Eitthvørt lið, sum hevur tapt 6-0, leingist at koma á vøllin aftur. Leikararnir eru øgiliga tráir at sleppa at á vøllin og vaska tapið av sær. Men til tað krevst at vit levera ein innsats sum er meiri enn 100 prosent, ljóðar tað frá landsliðsvenjaranum, sum ikki neyðturviliga metir tað vera ein fyrimun, at Ukraina fyri sovítt einki hevur at spæla fyri.

– Teir hava nógvar svangar leikarar á bonkinum, og slíkir kunnu blomstra upp í dystum sum hesum, sigur Jógvan Martin Olsen og vísir til dystin móti Fraklandi, har ungu innskiftarar veruliga imponeraðu, hóast sigurin langtsíðani var í hús.

# Altíð klárur at umboða landið

**Johan Troest Davidsen er klárur til sín fyrsta landsdyst**

LANDSLIÐIÐ
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

**Kiev, Ukraina:** Í grundini hevur hann framvegis aldur at spæla á U21-landsliðnum. Hann kundi verið við í sigrinum móti Aserbajan, men sat í staðin smáskaddur á síðulinjuni og eygleiddi nýggju liðfelagar sínar, sum vóru eyðmýktir av fronskum heimsstjørnum. Nú bilar skaðin ikki meiri. Johan Troest Davidsen kann spæla, og Johan Troest Davidsen skal spæla, tá føroyska liðið fer á vøllin í kvøld.

– Eg eri altíð klárur at umboða land mítt, sigur hann avgjørdur.

Johan Troest Davidsen er verjuleikari, sum kann spæla á øllum plássum á aftastu ketuni. Jógvan Martin Olsen ynskir at brúka hann í høgra borði.

– Hetta verður mín fyrsti A-landsdystur, men á ungdómslandsliðunum havi eg ongantíð spælt síðubakkur. Tað havi eg tó roynt í feløgunum, eg havi spælt í og at royna tað á landsliðnum verður spennandi, sigur maðurin, sum hóast sín unga aldur hevur spælt í NSÍ, Everton og Skála.

– Í míni tíð í Everton var eg á White Hart Lane hjá Tottenham og Goodison Park hjá Everton. Tey rúma eini 40.000 áskoðarum, so hetta er tað størsta stadion, eg havi verið á.

Spurdur um, hvussu hann roknar við at dysturin í kvøld fer at taka seg út, svarar Johan Troest Davidsen, at hann persónliga ætlar at gera alt hann er mentur.

– So fáa vit at síggja hvussu langt tað røkkur, men tá hetta er fyrsti landsdysturin hjá mær, er tað ilt at meta um, hvussu tað fer at ganga hjá okkum. Vit skulu tó sjálvandi inn og gera tað betri enn móti Fraklandi, sigur altso Johan Troest Davidsen, sum eftir øllum at døma fær debut á føroyska landsliðnum í kvøld.

# 24 ár og flest royndir

**Jón Rói Jacobsen er royndasti maðurin í føroysku verjuni, sum annars er mannað við trimum NSÍ'arum**

LANDSLIÐIÐ
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

**Kiev, Ukraina:** Jón Rói Jacobsen er einasti føroyski verjuleikarin á vøllinum í kvøld, sum hevur altjóða royndir. Óli Hansen og Johan Troest Davidsen skulu spæla sín fyrsta landsdyst, meðan Einar Hansen sleppur at royna seg fyri aðru ferð.

Tað merkir at 24 ára gamli Jón Rói Jacobsen eftir øllum at døma verður stýrimaðurin í verjuni, har annars tríggir fjórðingar spæla við NSÍ.

– Ja, nú fáa vit at síggja. Vit fara at tosa um tingini, men eg eri so tann av okkum, sum hevur flest royndir í landsliðshøpi, svaraði Jón Rói Jacobsen, tá vit eftir venjingina spurdu hann, um hann var klárur at stýra føroysku verjuni.

Móti fraklendingum kom Jón Rói Jacobsen og føroyska verjan undir eitt øgiligt trýst, og heili seks mál fóru ígjøgnum. Havnarmaðurin í AaB ivast heldur ikki í, at føroyska verjan nokk skal fáa seg roynda móti Ukraina.

– Eysturevropeisku liðini hava vit ofta havt trupulleikar av. Teir trýsta hart og spæla skjótt. Ukraina er eitt lið í heimsflokki, heldur Jón Rói Jacobsen. At størsta stjørnan, Andriy Shevchenko, er leikbannaður í kvøld fær heldur ikki Jón Róa at síggja lætt upp á uppgávuna.

– Sjálvandi er tað gott hjá okkum, at Shenchenko ikki er við, tá hann er besti leikari teirra. Men inn fyri hann kemur ein annar góður maður. Sjálvandi ikki á heilt sama støði sum Shevchenko, men ein sum fegin vil prógva sítt virði, so tað broytir kanska ikki so nógv kortini, metir Jón Rói Jacobsen. Hann metir somuleiðis, at føroyska liðið skal spæla fyri teimum møguleikunum, sum teir fara at fáa móti Ukraina.



Ukrainskir fjølmiðlar prátaðu við Jón Róa Jacobsen eftir venjingina í gjárkvøldið

Mynd: Rólant Waag Dam

– Sum altíð skulu vit gera ein góðan innsats fyri at fáa eitt gott úrslit. Ukraina er eitt sera sterkt lið, men kjansir fáa vit heilt sikkurt og teimum skulu vit fara eftir, sigur Jón Rói Jacobsen, sum svarar soleiðis, tá hann varð spurdur hvat eitt gott úrslit er:

– Á útivølli móti Ukraina hevði javnleikur verið eitt sera gott úrslit. Ein sigur er sjálvandi eisini góður, men eitt tap er ongantíð gott.